VB-KÍ 5-1 (0-0):

# Tað rapar hjá KÍ

**Kurvan hjá KÍ hevur beina kós niðureftir. Leygardagin fingu klaksvíkingarnir av at vita í Vági, har VB við einum knúsandi 5-1 sigri lyfti sær av botnsessinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Longu undan dystinum á Eiðinum leygardagin tóktist greitt, at formkurvan hjá teimum báðum liðunum peikaði hvør sín veg. Hóast tapið fyri B36 í miðvikuni, so hevur tað sæð hampuliga skilagott út hjá VB seinastu tíðina, meðan tað hinvegin ikki hevur vilja borið nakað sum helst til hjá KÍ.

At vágbingar so eisini sóu møguleikan í at fara av niðurflytingarsessinum mundu verið ein betri sálarlig gularót, enn hóttanin um botnstríð var fyri KÍ.

Tí var kanska ikki annað væntandi, enn at talan gjørdist ein hampuliga spentan fyrra hálvleik, har hvørgin parturin vildi ota seg alt ov langt fram á vøllin, og á tann hátt liggja berur aftanfyri.

### Sálarligur munur

Vágbingar tóktust tó at vera sálarliga betri gearaðir til dystin. Teir vunnu fleiri nærdystir, teir vóru grammari á bóltinum, og meira enn nakað, so sýndist hugburðurin hjá hvørjum einstøkum spælara eisini at vera betri, enn hann var hjá KÍ.

Tí var tað kanska einamest ein spurningur um tíð, áðrenn hol kom á, og tann tíðin var komin stutt inn í seinna hálvleikl. Tá skoraði Dan Djurhuus eftir gott uppspæl í høgru, og so hildu vágbingar, at nú vóru stigini heima.

Klaksvíkingarnir svaraðu tó aftur, tá Heðin á Lakjuni við annars kalda høgra beininum langaði bóltin í kassan, men fyri KÍ mundi hetta kennast á leið sum at pissa í buksurnar ein kaldan vetrardag.

Vágbingar settu bara meira á, og tá teir so aftur skoraðu, rapaði alt saman hjá KÍ. Við einum 1-5 ósigri fóru teir sum flongdir hundar norður um fjørðin, meðan vágbingar hinvegin kundu fegnast. Teir lyftu seg av botnsessinum, og tað mundi í øllum førum kennast sum stórur fløvi, áðrenn studentarveitsla og jóansøka komu á skránna.



*Vágbingar vildu meira. Teir stríddust eisini meira, og fram um alt, so skoraðu teir eisini nakað væl meira, enn KÍ gjørdi, tá liðini tørnaðu saman leygardagin*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Truplir heimadystir á skránni

So er spurningurin, um góða lagið fer at standa við. Komandi umfarið skal VB taka ímóti meistarunum úr HB, og verður hugburðurin til ta uppgávuna tann sami, sum hann hevur verið seinastu ferðirnar, so eru stig á ongan hátt óhugsandi.

KÍ skal tá á heimavølli taka ímóti B36, og nú eru stig mest sum vorðin lívneyðug hjá teimum bláu. Hvat lið talan er um, hevur kanska minni týdning í so máta, og við eini dystarskrá, sum telir tey bæði havnarfeløgini á rað, er helst eingin løtt loysn hjá klaksvíkingunum.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-KÍ 5-1 (0-0)**
1-0 Dan Djurhuus, 49.
1-1 Heðin á Lakjuni, 52
2-1 Edvard Blé, 58.
3-1 Jón Krosslá Poulsen, 79,
4-1 Dan Djurhuus, 81.
5-1 Símun Samuelsen, 86.
**Dómari:** Birgir Sondum.
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Suni úr Hørg, Anders Sørensen, Jákup Olsen – Dan Djurhuus, Dánjal Johan Joensen (Jón Krosslá Poulsen, 76.), Edvard Ble, Símun Samuelsen – Poul N. Poulsen (Hallur Dam Joensen, 65.), Nenad Zivanovic.
**GK:** Nenad Zivanovic
**KÍ:** Karstin Joensen – Kristoffur Jacobsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Marek Wierbicki – Høgni Madsen - Hjalgrím Elttør (Tórður Lervig, 71.), Arnold Joensen, Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni – Ove Nysted.
**GK:** Høgni Madsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen.

## MÁLINI

**1-0** Dan Djurhuus, 49.
Gott VB-uppspæl í høgru endar inni hjá Dan Djurhuus, sum avgreiðir uttan stórvegis hóvasták.
**1-1** Heðin á Lakjuni, 52.
Staddur beint uttan fyri brotsteigin langar Heðin til við høgra beininum. Og hóast Bjarni Johansen toyggir seg, hevur hann ongan møguleika at taka skotið.
**2-1** Edvard Blé, 58.
Innlegg úr vinstru endar við handaru stong, har Blé ótarnaður kann stúta bóltin í kassan.
**3-1** Jón Krosslá Poulsen, 79,
Langt innkast verður longt av Dan Djurhuus, og so er Jón púrasta leysur mitt fyri.
**4-1** Dan Djurhuus, 81.
Hesaferð er tað Dan, sum kemur at standa væl fyri, og so noyðiast Karstin fyri fjórðu ferð í dystinum inn í málið eftir bóltinum.
**5-1** Símun Samuelsen, 86.
KÍ er nú dottið fullkomuliga saman, og so er talan mest sum um avgreiðsluspurning, tá Símun kann feira studentarhúgvuna við fimta VB-málinum á degnum.

# Fíggjarstøðan lammar KÍ

Klaksvíkingar vóru í ár teir fyrstu, sum sekkjaðu ein venjara. Boðini ta ferðina vóru, at úrslitini ikki vóru nøktandi, og vónin var tí, at nýggjur maður kundi vera við til at venda skútuni.

Soleiðis hevur tó ikki verið. Eitt sætta pláss er í sjálvum sær kanska eingin vanlukka. Men tá stigatalvan samstundis ber boð um, at bara eitt stig er niður á botnin, fer tað av álvara at stramma. Og tá avrikini hava verið somikið tunnlig, sum tey hava verið seinastu dystirnar, fara alarmklokkurnar av álvara at ringja.

- Talan er sjálvandi ikki um nakra góða støðu hjá okkum, sigur John William Joensen, sum hevur ábyrgdina av uttanhýsis samskiftinum hjá KÍ.

- Men samstundis, so vit bæði vit og spælararnir, at talan ikki er um nakra lætta loysn upp á trupulleikan. Vánaliga fíggjarstøðan ger, at vit ikki bara kunnu fáa spælarar uttan ífrá í tíð og útíð, og í so máta kanst tú væl siga, at vit eru nokk so lammaðir. Tí eru vit noyddir at dúva upp á okkara egnu spælarar, og um teir ikki megna tað, so megna vit tað ikki.

Men kann eitt felag sum KÍ liva við vandanum fyri at fara niður í aðru deild?

- Tað kunnu vit verða noyddir til. Tað er í øllum førum eingin, sum sigur, at KÍ ikki KANN flyta niður. Reglurnar er sera einfaldar í so máta, og ert tú ikki nóg góður, so flytur tú niður. Tað vita bæði vit og spælararnir.

### Virða stevnurnar

Sum støaðn í KÍ er nú, so fekk tað ilt í fleiri, at KÍ hevði eftirlíkað ynskinum hjá VB, um at dysturin hetta umfarið varð fluttur til Vágs, heldur enn at verða spældur í Klaksvík.

- Tað er so ein avgerð, sum varð tikin fyrr í ár. VB spurdi, um teir kundu sleppa at spæla heimadyst um jóansøkuna, og hesum vildu vit ikki seta okkum upp ímóti. Fyrr var jú vanligt, at fótbóltskappingin varð løgd, so hon sampakkaði við stevnurnar, men tað hevur so ikki verið galdandi í ár. Vegna landsdyst høvdu vit ongan dyst har á norðoyastevnu, og ætlanin var so heldur ikki, at VB skuldi hava heimadyst um jóansøkuna. Har vildu vit ikki stilla okkum tvørar, og tí eftirlíkaðu vit ynskinum um at flyta dystin. Men sjálvandi kanst tú í bakspeglinum siga, at vit heldur burdi fingið dystin á heimavølli.

### Vilja meira

Tað ljóðar nærum, sum er talan um eina mótfalna leiðslu, tá ljóti veruleikin bara uttan víðari verður góðtikin, men John William leggur dent á, at KÍ framvegis vil vera annað og meira enn botnlið.

- Vit halda í øllum førum, at vit hava tilfar til meira enn hetta. Og vit royna eisini at seta allar kreftir til. Sjálvandi vita vit, at menn sum Harley, Marek og Jan Joensen kanska ikki kunnu loysa spælið upp av sær sjálvum. Men teirra royndir og teirra verimáti kann vónandi stuðla upp undir hinar spælararnar í hópinum. Sjálvandi royna vit eisini at arbeiða við øðrum loysnum, men sum sagt, so er tað ógvuliga tungt, tá fíggjarliga støðan er somikið trong, sigur John William Joensen at enda.

**-jm**

# Væl nøgdir B36'arar

**B36 skal til íslands at spæla móti íslendska ÍBV, meðan NSÍ skal til Letlands at spæla móti Metalurgs**

UEFA-Cup
*Jákup Mørk*

Beint eftir evstamark av vikuskiftisútgávu okkara, var lutakastið til UEFA-Cup kappingina á skránni.

Her vóru føroysku liðini í pottinum B36 og NSÍ, og serliga B36 helt seg her fáa eitt gott lutakast.

Teir fingu nevnlia íslendska ÍBV í sín lut, og tá vit fríggjadagin høvdu Kristian á Neystabø í telefonini, kundi hann ikki annað enn lata væl at.

- Bæði ítróttarliga og fíggjarliga halda vit, at talan var um eitt gott lutakast. Teinurin til Íslands er ikki langur, og við heimadyst á ólavsøku er hetta avgjørt eitt lutakast, sum er sera gott fíggjarliga.

Um ítróttarligu møguleikarnir segði Kristian, at teir í hesum hava fingið eitt lið, sum teir vóna seg hava ein møguleika ímóti.

Og tað er kanska eisini nakað um tað. Í øllum førum hevur ÍBV havt eina sera laka byrjan upp á kappingarárið í ár, og eftir fyrstu sjey umførini eru teir á næst niðasta sessinum.

Og talan er eisini um eitt lið, sum er væl veikari enn tað, sum í fjør vann sær rættin til europeiska luttøku.

Ikki minst hevur tað tikið fast, at miðvallarin, Bjarnálvur Lauruson, ið áður hevur spælt við Hibernian, í ár varð seldur til KR. Og at toppskjúttin frá í fjør, Gunnar Heiðar Þórvaldsson, varð seldur til Svøríkis.

**Runavíkingar til Letlands**

Mótstøðuliðið hjá B36 í fjør, letlendska Metalurgs, var aftur hesaferð í føroyskum potti. Teir skulu nevnliga í ár royna seg móti NSÍ, sum soleiðis ikki tóktist fáa eitt heilt so heppið lutakast sum B36.

Í fjør gjørdist talan um letlendskan stórsigur á B36, men í nógvar mátar mundi tað úrslitið eisini vera úrslit av tilrættisleggingini hjá B36, har teir bæði ferðaðust og spældu sama dag.

Í útvarpinum segði NSÍ-málverjin, Jens Martin Knudsen, at hann ikki var serliga ónøgdur um úrslitið.

- Tað kundi jú verið nógv verri. Ítróttarliga vil talan altíð vera um truplar uppgávu. Tað er heldur ikki verri enn ilt at ferðast til Letlands, og vit fara í øllum førum undir uppgávuna við góðum treysti, staðfesti NSÍ-veteranurin.